

# Tingmaður: Stórar vónir til føroysku oljuna

**Jan Müller**

06.10.2013 - 19:38

Oljan.fo

Hóast komandi oljuboringar á landgrunninum ikki áttu so nógva rúmd í orðaskiftinum um fíggjarlógina, so vóru tað kortini tingmenn, ið tóku fram oljuleitingina komandi ár og hildu, at hon hevur stóran týdning fyri Føroyar.

Ein teirra var Alfred Olsen, tingmaður fyri Sambandflokkin. Hann helt fyri, at ringt er at siga, hvussu fer at ganga við boringunum næsta ár, men sjálvur vónaði hann, at tær fara at vera positivar, og at olja verður funnin í slíkum nøgdum, at tað loysir seg at framleiða hana.

“Hetta vildi við tíðini skapt eina gagnliga inntøku fyri føroyska samfelagið,” segði hann, og í hesum sambandi vísti tingmaðurin eisini á ætlanina at brúka pengar til at marknaðarføra Føroyar sum eitt áhugavert land at gera oljuboringar í.

Hann nam eisini við ætlanina hjá landsstýrinum at gera meira burtur úr varandi

orkumøguleikum.

“Tá hugsað verður um orku, so hevur samgongan gjørt av, at vit skulu økja um okkara varandi orkukeldur, bæði tá talan er um vatn, vind, sjóvarfallsorku og sólorku.”

Alfred Olsen vísti á hvussu ávirkað vit eru av streymorkunýtsluni, har bara eitt virki í landinum, Varðin Pelagic, hevur við sær, at ov lítil orka er til í Suðuroynni, og tí er SEV tvingað til at seta ein motor upp aftrat í oynni.

“Vit áttu at útbygt varandi orku har suðuri eisini,” segði tingmaðurin, sum vísti á, at SEV serstakliga hevur útbygt vatnorkuna men seinastu árini eisini vindorkuna.

“Tað at vit fáa fleiri vindmyllur settar upp ger, at vit spara olju og gera Føroyar meira umhvørvisvinarligar og grønar. Tað vil eisini gagna vinnulívinum í Føroyum.”

Tingmaðurin segði seg annars síggja nakað stórt í sjóvarfallsorku og teimum royndum, sum nú verða gjørdar í Vestmannasundi